

*Møðgurnar Katrin Dahl Jakobsen og Edith Jakobsen fara í næstum til New York á ST-aðalfund. Báðar rokna tær við einum rimmar upplivilsi.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Við mammu til New York

**Tá tingkvinnan Katrin Dahl Jakobsen fer til á ST-aðalfund í New York í næstum, tekur hon dóttur sína við. Hon skal m.a. vera í praktikk hjá einum politikara, og so uppliva tað, ið hesin stórbýur hevur at bjóða**

FERÐAN
*Heri á Rógvi*

Tað hevur sínar fyrimunir at vera politikari. Av og á fáa hesir okkara útvaldu tilboð, ið kanska ikki beinleiðis fella øllum í lut.

Hvørt ár sleppa tveir føroyskir politikarar, umframt løgmann, til New York á ST-aðalfund. Føroysku politikararnir eru partur av teirri donsku sendinevndini, ið fer yvir til New York, har ST hevur høvuðssæti. Í ár er eitt sindur øðrvísi, tí Danmark hevur formansskapin í ES, sostatt verður Danmark talsmaður hjá ES á øllum økjum, og hetta krevur nógva orku. Tískil verður bert tann eini luttakarin boðin við til New York úr Føroyum.

Føroyingar hava so gjørt at býta uppgávuna millum tveir. Talan er Katrina Dahl Jakobsen, løgtingskvinnu fyri Javnaðarflokkin, og Jógvan við Keldu, løgtingsmann fyri Fólkaflokkin.

Tað eru danir, ið gjalda fyri alt gildið. Døttrina, ið Katrin ætlar at taka við sær, má hon tó sjálv gjalda fyri.

Vit vóru ein túr framvið hjá Katrini og hennara fólki á Villingardalsvegnum.

## So nógv sum gjørligt

Fyri Katrina Dahl Jakobsen er hetta fyrstu ferð, at hon fer yvir til New York. Vanliga gongur tað uppá skift millum flokkarnar, og hesa ferð átti so Javnaðarflokkurin tørn. Katrin var fyri fyrstu ferð vald inn á ting í 1998 og varð afturvald á valinum 30. apríl í Suðurstreymoyar valdømi.

Við sær til New York hevur hon dóttur sína Edith. Tað er langt frá óvanligt, at politikarar taka familjuna við sær, og tað verður eisini lagt upp til. Luttakararnir – í øllum førum teir føroysku – fáa eina stóra íbúð á einum hotelli, har pláss er

*Elin Lindenskov*

fyri familjuni.

Í hesum førinum verður kortini ikki talan um alla familjuna, tí boðini um at Katrin skuldi til New York komu so seint, at tá hevði maður hennara longu spælt sær av við sína summarfrí, og hansara túrur og túrurin hjá yngsta soninum má bíða til eina aðru ferð.

Hyggja vit eftir skránni hjá Katrini í New York, so skal hon fyrst og fremst vera partur av donsku sendinevndini. Hon verður mest við sum eygleiðari, og hon sleppur valla til orðanna á nøkrum fundi.

— Málið er at fáa so nógv burturúr sum gjørligt, sigur Katrin Dahl Jakobsen.

Tað nógva av tíðini verður nýtt til "generaldebattina", sum verður í átta dagar. Har spælir Danmark ein lyklaleiklut við formansskapinum í ES.

Eisini verður eitt kjak um Afrika á skránni.

Eisini er vert at nevna, at Katrin við tvey høvið fær møguleikan at vera saman við Fríðrikki krúnprinsi. Hetta verður við ein deligatiónsfund og til ein døgurða.

ST-aðalfundurin er í døgunum 10. september til 5. november. Katrin verður í New York til fyrra partin av aðalfundinum frá 10. september til 1. oktober.

## Praktikk

Sum nevnt hevur Katrin døtturina Edith við sær til New York. Edith er fjúrtan ára gomul, og hon gongur í 9. flokki í Eysturskúlanum.

Meðan Edith er yviri í New York fyllir hon fimtan ár, soleiðis at hon sleppur at halda føðingardag í The big Apple.

Tað eydnaðist Edith at fáa frí úr skúlanum til at fara til New York, men hetta merkir ikki, at hon sleppur undan skúlatingunum. Bøkurnar og heimaarbeiði eru við í taskuni, og mamman fer at hjálpa henni við skúlaarbeiðinum.

Sjálv roknar Edith við at fáa eitt gott upplivilsi í New York. Meðan mamman er á fundi, má hon undirhalda sær sjálvari, men hon sleppur at ferðast sum hon vil í ST-bygninginum, men mamman ætlar ikki at loyva henni at ferðast einsamalla í New York. Hon verður tó ikki meira einsamøll enn, at hon fær vitjan av stórabeiggja sínum og konu hansara í tvær vikur.

Meðan hon er í New York fara floksfelagarnir í praktikk. Hetta hava tey eisini funnið eina loysn uppá, tí Edith fer so bara í praktikk hjá einum politikara, sum altso í hesum førinum eisini er mamma hennara. Tá hon kemur aftur til Føroya fer at royna seg sum lærara í Eysturskúlanum í eina viku.

—Tað verður ógvuliga spennandi at síggja, hvussu alt virkar har yviri og fáa eitt innlit í politiskt arbeiði, sigur Edith Jakobsen.

## 11. september

Tær báðar leggja leiðina vesturum hav 10. september, og dagin eftir verður stórt hátíðarhald í sambandi við ársdagin fyri yvirgangsatsókninar hin 11. september í fjør.

Skipað verður fyri stórum hátíðarhaldi, og pláss er sett av í skránni, soleiðis at tær báðar sleppa at uppliva tað nógva hátíðarliga, sum amerikumenn jú eru so kendir fyri.

## Elin fyri Katrina

Meðan Katrin Dahl Jakobsen er í New York á ST-aðalfundi, so hevur fingið farloyvi úr løgtinginum. Hetta merkir so, at varamaður hennara, sum í hesum førinum er ein varakvinna, kemur í hennara stað.

Talan er um Elin Lindenskov. Hon hevur drúgvar royndir frá Tórshavnar býráð, har hon hevur sitið síðani 1992. Hon gjørdist nummar trý á listanum hjá Javnaðaflokkinum á løgtingsvalinum seinast við 191 atkvøðum.



Hetta var fyrstu ferð, at Elin Lindenskov stillaði upp til eitt løgtingsval. Seinasti mikudag tók Elin Lindenskov sæti á tingi.



Rúni Joensen, nýggjur aðalstjóri:

# Ivaðist ikki í at søkja

**— Tað var rættiliga nær liggjandi hjá mær at søkja starvið, og hetta verða fyri tað nógva mínar verandi arbeiðsuppgávur, ið eg fari at røkja, sigur Rúni Joensen, sum er settur í starv sum aðalstjóri í Løgmálaráðnum**



*Rúni Joensen ivaðist ikki í at søkja starvið sum aðalstjóri á Løgmálaráðnum. Hóast ráðið fær sína sak fyri, so roknar hann við at hóra undan.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

AÐALSTJÓRI
*Heri á Rógvi*

Vágbingurin Rúni Joensen er settur í starv sum aðalstjóri fyri nýggja Løgmálaráðið. Talan er um eitt spildurnýtt stýri. Løgmálaráðið verður umsitingin hjá Høgna Hoydal, varaløgmanni og landsstýrismanni í lógarmálum.

Undir landsstýrismanninum í løgmálum hoyra hesa málsøki: dómsmál, grundlógararbeiði, kommunumál, lógarmál,løgregla og ákæruvald, norðurlandamál, skráseting og nøvn og útlendingamál.

Rúni Joensen greiðir frá, at Løgmálaráðið eftir ætlan fer at nýta eini 17 starvsfólk. Rúni Joensen hevur seinastu árini verið deildarstjóri á løgdeildini hjá løgmansskrivstovuni. Áðrenn hetta var hann løgmansritari. Tað verður fyri tað nógva løgdeildin, sum fer at manna nýggja ráðið.

— Útgangsstøðið verður í løgdeildini á løgmansskrivstovuni. Harumframt verður landsfólkayvirlitið eisini ein integreraður partur av ráðnum, sigur Rúni Joensen.

Hann metir, at ráðið fer at virka frá 1. oktober, tá alt skuldi verið komið uppá pláss. Broytingarnar umsitingarliga eru smáar. Talan verður um at flyta nøkur fólk úr einum ráðið/stýri til eitt annað. Fólkini fara sum heild at húsast á sama stað. Løgmálaráðið fer at nýta fleiri bygningar úti í Tinganesi. Gamli Prestagarðurin, Leigbúðin, Skibsteds-pakkhús og í løtuni hyggja tær eisini uppá møguleikararnar at nýta gomlu Munkastovuna, sum er tann elsti bygningurin í Tinganesi til umsitingina hjá Løgmálaráðnum.

## Somu uppgávur

Fyri Rúna Joensen sjálvan verður broytingin frá at vera deildarstjóri til at verða aðalstjóri ikki tann øgiliga.

— Hetta verða fyri tað nógva mínar verandi arbeiðsuppgávur, ið eg fari at røkja. Tað vera í starvinum sum aðalstjóri fleiri umsitingarligar uppgávur, sigur Rúni Joensen.

Hann hevur í sínum starvi sum deildarsjóri fingist nógv við fyrireikan av yvirtøkum. Hansara røtur í embætismannaverkinum røkka so langt aftur sum til bankakanningina, og hann hevur verið virkin í øllum arbeiðinum hjá eldra eins og nú núverandi fullveldis/sjálvstýris landsstýrinum.

— Eg komi í framtíðini at samskipa tað mesta í sambandi við okkara leiklut í yvirtøkunum, sigur Rúni Joensen.

Familju og arvarætturin og fjølmiðlaábyrgdin skulu yvirtakast, og hetta arbeiðir skal Løgmálaráðið standa fyri Løgmálaráðið kemur væntandi at spæla ein leiklut í sambandi við yvirtøkurnar hjá øðrum stýrum eisini.

Rúni Joensen er heldur ikki í iva um, at hesin uppgávurnar klárar nýggja ráðið at avgreiða, áðrenn fýra ára skeiðið er runnið.

Sambært Rúna verður arbeiðsbyrðan hjá nýggja ráðnum stór, men tað eru tey von við, sigur hann.

Rúni heldur ikki, at arbeiðsuppgávurnar vildu vera so nógv broyttar, um eitt nýtt – kanska ikki so sjálvstýrissinnað - landsstýri vildi komið til valdi.

— Tempoið verður kanska broytt nakað. Tað er ein prosess, sum er sett ígongd, sigur Rúni Joensen.

Hann greiðir frá, at vanligt er at savna alla løgfrøðiligu servitanina á einum stað í einari landsumsiting.

— Vanliga er eitt ráð sum løgmansskrivstovan ikki so stórt. Har eru sjálvandi nakrir løgfrøðingar, men vanligt er at tann løgfrøðiliga servitanin og fyrisitingina fyri tað nógva verður savnað í einum løgmáláráð, sigur Rúni Joensen.

Hann sigur tað eisini vera vanligt, at løgreglan hoyrir til eitt løgmálaráð. Hetta er tó, í øllum førum ikk enn, galdandi í Føroyum.

## Ivaðist ikki

Fýra umsøkjarar vóru til starvið sum aðalstjóri á løgmálaráðnum. Starvið er væl lønt, og í fyrisitingini er hetta hægsti sessurin at fáa í einum ráði.

— Eg ivaðist onga løtu í at søkja starvið. Tað var rættiliga nærliggjandi, at eg søkti starvið við mínum verandi starvi sum deildarstjóri á lógardeildini, sigur Rúni Joensen.

Sambært Rúna er áhugin fyri at starvast við nýggja løgmálaráðið stórur.

— Vit hava fleiri umsóknirnir liggjandi, sigur hann.

Um starvið sum aðalstjóri sigur Rúni, at hetta starvið krevur ein persón, sum hevur áhuga fyri tí fyrisitingarliga. Talan er ikki um tann meira vinnuliga partin av løgfrøðini og advokatarbeiðinum, sigur Rúni.

At fleiri starvsfólk koma at starvast hjá løgmálaráðnum roknar Rúni við.

Sosialurin ynskir Rúna til lukku við nýggja starvinum.

## FAKTA

Rúni Joensen er 43 ára gamal og ættaður úr Vági. Eftir lokna útbúgving sum løgfrøðingur hevur hann arbeitt á Landsskrivstovuni í eitt ár, í danska Toll- og skattastýrinum í hálvt annað ár og sum verkætlanarleiðari á føroysku Toll- og MVG verkætlanini í tvey ár. Harumframt hevur hann verið advokatfulltrúi í tvey ár, advokatur í eitt ár og løgmansritari í trý ár. Hann fer úr starvi sum deildarstjóri á lógardeildini hjá Løgmansskrivstovuni.

Rúni hevur fingist nógv við arbeiðið í sambandi við yvirtøkur. Hann hevur verið til allar fundirnar við donsku stjórnina hjá núverandi samgonguni, og hann er formaður fyri embætismannabólkin í sambandi við ætlaðu yvirtøkurnar.

## Soleiðis finnur tú ein aðalstjóra

AÐALSTJÓRI
*Heri á Rógvi*

Tá nýggi landsstýrið skipaði eftir, at Tjóðveldisflokkurin, Fólkaflokkurin, Miðflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin høvdu skipað samgongu, gjørdist greitt, at stýrini nú skuldu eita ráð, og fyribils eitt nýtt stýrið kom eisin undan kavi.

Løgmálaráðið skuldi vera ráðið hjá Høgna Hoydal, varaløgmanni.

Eftir at løgmaður hevur góðkent, verður søkt eftir aðalstjóra til løgmálaráðið. Í lýsingini stendur, at aðalstjórin skal vera løgfrøðingur ella hava aðra samsvarandi útbúgving frá hægri lærustovni.

Fýra umsóknir koma til starvið.

Eftir hetta verður ein setanarbólkur settur. Manningin er hendan:

Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóri (formaður), Bergur Berg (starvsfólkaumboð), Eyðbritt á Plógv (umboð fyri aðalstjórarnar) og Petur Simonsen, umsitingarleiðarin á løgmansskrivstovuni.

Hesi fólkini gera so eitt tilmæli eftir at hava viðgjørt og lýst umsøkjararnar til Høgna Hoydal og Anfinn Kallsberg, sum eru setingarmyndugleiki í hesum førinum.

Tað hevur ikki eydnast okkum at fingið upplýst, um tilmæli frá setanarbólkinum varð fylgt.

Nýggi aðalstjórin verður løntur sum hinir aðalstjórarnir í 39. lønarflokki í Tænastumannasáttmálanum, av tí at starvið er tænastumannastarv.

Hetta gevur honum við føstum viðbótum kr. 42.348,34 um mánaðin umframt eina viðbót upp á kr. 3.984,75 fyri at vera aðalstjóri.

Samanlagt fer nýggi aðalstjórin at fáa kr. 46.333,09 í fastari løn frá landskassanum hvønn mánaða. Ella 555.997,08 krónur um árið.